# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# B36 tók steypið

**B36 var undir hørðum trýsti í longdu leiktíðini, men teir hildu tætt, og so tóku teir steypasigurin hjá unglingum eftir brotssparkskapping ímóti KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fagnaðurin var øgiligur, tá liðskiparin hjá B36, Odmar Færø, hevði tikið ímóti steypinum. Her sæst hann samamn við vanliga málverjanum, Jóan Paula Jakobsen, sum í løtuni er uttan fyri við beinbroti*

B36 legði harðliga fyri í steypafinaluni hjá unglingum, sum varð spæld á Skála mikukvøldið. Mótstøðuliðið var KÍ, og áðrenn spælararnir hjá KÍ vóru raknaðir við, hevði B36 skorað tvær ferðir.

Fyrst var tað Johan Ellingsgaard, sum stútaði eitt frísparksinnlegg í málið, og so var tað Sjúrður Thomasen, sum við eini góðari fintu spældi seg sjálvan leysan í brotsteignum og sendi í handara síðunet.

Alt hetta hendi innanfyri fyrsta korterið av dystinum, og hesa fyrstu løtuna var B36 naskari. So hvørt sum fyrri hálvleikur leið, kom KÍ meira inn í dystin, og teir høvdu onkra góða roynd at minka um munin fyri hálvleikssteðgin.

### Javnaðu leiðsluna

Í seinna hálvleiki setti KÍ seg tungt á dystin. Liðið spældi seg til fleiri góðar kjansir, og tvær ferðir eydnaðist at skora. Fyrsta minkaði John Hammer um munin við einum góðum skoti, eftir at hann rak inn í brotsteigin, og so javnaði Dánjal Pauli Lervig, eftir at hann hevði fintað tveir B36-verjuspælarar stutt úr málinum.

B36 kom eitt sindur fyri seg eftir útjavnandi málið, men KÍ var betra liðið og var vandameira meginpartin av tíðini.

Neyðugt varð við longdari leiktíð, og hon endaði við einum stórum KÍ-trýsti á B36-málinum. Fleiri ferðir vóru KÍ-spælarar mest sum leysir í brotsteignum, og tá stórspælandi B36-málmaðurin ikki vardi fyri, bjargaðu útispælarar á strikuni.

Seinasta KÍ-atsóknin endaði við, at leysi álopsspælarin sendi móti málinum, B36-málmaðurin pareraði, bólturin hevði kós ímóti málið, men ein B36-verjuspælari sparkaði burtur í evstu løtu.

Í seinna hálvleiki og í longdu leiktíðin hevði KÍ yvirvág í spæli og kjansum, men B36-spælararnir vardu manniliga. Og tað gav úrslit, tí tá alt endaði við brotssparkskapping, misnýtti KÍ tvær ferðir og B36 einaferð, og so kundu teir fegnu B36-spælararnir hálsfevnast og taka steypið við sær til Havnar.

# Vertstjóðir í vanda

Síðani EM-endaspælið varð skipað við bólkaspælið, hava vertstjóðirnar vanliga staðið seg væl. Men í so máta verður endaspælið hesa ferð kanska eitt undantak. Við tapinum móti Turkalandi í gjár er Sveis at kalla úti úr kappingini, tó at teir í teori'ini enn hava møguleikan at vinna seg víðari.

Í kvøld er tað so Eysturríki, sum skal til próvtøku. Vinnur liðið á Póllandi, eru framvegis hampulig útlit fyri at spæla seg víðari. Men verður talan um tap ella javnleik, verður málið um eitt pláss í fjórðingsfinaluni nærum vónleyst at røkka.

---

### EM-dystir

**Úrslit**
**Bólkur A**
**Kekkia-Portugal 1-3**
0-1: Deco, 8.
1-1: Libor Sionko, 17.
1-2: Cristiano Ronaldo, 63.
1-3: Ricardo Quaresma, 90.

**Sveis-Turkaland 1-2**
1-0: Hakan Yakin, 32.
1-1: Semih Senturk, 57.
1-2: Arda Turan, 90.

**Komandi dystir**
**Bólkur B**

| **Dagur** | **Kl.** | **Dystur** |
|---|---|---|
| 12.06 | 17.00 | Kroatia-Týskland |
| 12.06 | 19.45 | Eysturríki-Pólland |

**Bólkur C**

| | | |
|---|---|---|
| 13.06 | 17.00 | Italia-Rumenia |
| 13.06 | 19.45 | Holland-Frakland |

# Løgmanssteypið á Rás1

**Rás1 hjá Televarpinum sendir beinleiðis, tá Steypafinalan í føroyskum mansfótbólti verður spæld leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Sveinur Tróndarson, formaður í kappingarnevndini hjá FSF, og Laila Hentze, stjóri á Televarpinum, skriva undir avtaluna*
*Mynd: www.fsf.fo*

FSF og Televarpið gjørdu í gjár avtalu um at senda finaluna í kappingini um Løgmanssteypið beinleiðis á Rás 1 hjá Televarpinum.

R2 Net v/Petur Jacobsen og HD-Myndir v/Hans Erik Danielsen standa fyri sjálvari upptøkuni og sjónvarpsframleiðsluni av dystinum.

Finaludysturin verður spældur kl. 18.15, og sendingin á Rás 1 byrjar umleið kl. 17.45. Sent verður til steyp og heiðursmerki eru handað.

Sendingin frá Løgmansfinaluni verður endursend sunnudagin 15. juni kl. 15.00